# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar til B7

Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum til B7 á starvsbrøki 1,0 í skiftandi vaktum til setan 1. apríl 2008 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki:

- 1 fast starv
- 3 avloysarastørv vegna barnsburð til og við 30. september 2008

B7 er ein medisinsk deild, sum er nýumvæld. Sjúklingar og nøkur starvfólk frá med. deild E3, flyta saman við B7 í februar 2008.

Ætlanin er at byrja nýggja B7 við hesum sergreinum: Lungamedisin, nefrologi, hæmatologi, apoplexi, rheumatologi og onkologi.

Faklig menning við undirvísing og skeiðvirksemi innan serøkini hevur verið í vár og heldur fram. B7 er eisini byrjað við tvørfakligari konferansu hvønn morgun.

Aðrar áhugaverdar avbjóðingar, sum liggja fyri framman, verður implementering av THS primo 2008.

**Arbeisðuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevndu sergreinar

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur við góðkendari autorisatión ella sum heilsurøktari
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndun innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja 304500 til Jónu Augustinussen, deildarleiðara á B7, lokal 6067, lsjonau@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 3. mars 2008 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B8 (endurlýsing)

Vegna ov fáar umsóknir søkja vit av nýggjum eftir sjúkrarøktarfrøðingum til B8 á starvsbrøki 1,0 í skiftandi vaktum til setan 1. apríl 2008 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki.

- tvey føst størv
- eitt avloysarastarv til og við 30. september 2008

**Arbeiðsøkið er í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til kardiologiskar sjúklingar

**Krøv til umsøkjarar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í røkt og viðgerð av kardiologiskum sjúklingum
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt, avbjóðandi og fjølbroytt umhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- innleiðslu og upplæring

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- kardiologiskar royndir
- kardiologiska eftirútbúgving

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Jórun Højgaard, deildarleiðara, lokal 6068 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 3. mars 2008 kl. 12.00**

## Heilsurøktarar og sjúkrarøktarfrøðingar til E2 (endurlýsing)

Vegna ov fáar umsóknir endurlýsa vit 4 leys størv á E2 í skiftandi vaktum til setan 1. apríl 2008 ella eftir avtalu til og við 31. desember 2008.

Vit søkja sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar á starvsbrøki 0,8 við møguleika fyri hægri ella lægri brøki. Vit kunnu eisini tosa um, hvat slag av vaktum, tú trívist best við.

Umleggingar og umvælingar eru á medisinska deplinum. E3 verður flutt saman við B7 í februar 2008. Búfólk á E2 verða flutt á aðrar stovnar seinast 31. desember 2008.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum.Vit ynskja starvsfelagar við áhuga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur við góðkendari autorisatión ella sum heilsurøktari
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innn eldrarøkt

**Vit kunnu bjóða**
- eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- innleiðslu
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- fakliga menning

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Monicu Brickman, deildarleiðara á E3/E2, lokal 6012 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 3. mars 2008 kl. 12.00**

## Læknaskrivari

Á Medisinska deplinum er eitt fast starv sum læknaskrivari fulla tíð leyst at søkja til setan 1. mars 2008 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv**
- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja 304500 til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, lokal 6103.

**Umsóknarfreistin er 28. februar 2008 kl. 12.00**

## Audiologiassistentur til Hoyriklinikkina

Eitt fast heiltíðarstarv verður við hesum lýst leyst at søkja til setan 1. mars 2008 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv**
- prógv sum audiologiassistentur
- tænastusinni
- evni til at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja 304500 til Bjarka Ellefsen, yvirlækna, lokal 5367, t-post: lsbjael@ls.fo ella til Juttu Helgadóttir, audiologiassistent á telefon 322103.

**Umsóknarfreistin er 28. februar 2008 kl. 12.00**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo